# Løgmaður umber seg við arbeiðsplássum

**Løgmaður sigur, at málið um feilbókingarnar í Norðdepli, er fyri hansara viðkomandi avgreitt fyri 20 árum síðan. Anfinn Kallsberg viðgongur kortini at nakað óregluligt fór fram á Frostvirkinum**

LØGMANSNOTATIÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Løgmaður sigur, at málið um óregluligu bókingarar á Frostvirkinum, er fyri hansara viðkomandi avgreitt fyri tjúgu árum síðan. Hann ber seg kortini undan við, at feilbókingarnar vórðu gjørdar fyri millum annað at varðveita arbeiðspláss.*
*Mynd: Savnsmynd*

Løgmaður sigur bart út, at málið um óregluligu bókingarar í Frostvirkinum í Norðdepli, er fyri hansara viðkomandi avgreitt fyri tjúgu árum síðan. Hann vísir á, at tað er ómøguligt, at gera stórvegis viðmerkingar til eina bók, hann ikki hevur lisið.

Tað er kortini nakað sum bendir á, at hann viðgongur, at nakað óregluligt fór fram.

– Tað sum fór fram var, at skip og virki vóru involveraði og spurningurin var at útvega likividitet til útbetaling av lønum og likividitet til at dríva skipini, so virkið fekk fisk at virka, greiðir Anfinn Kallsberg frá.

Ein útlegging av viðmerkingini hjá løgmanni, kann verða, at orsøkin til feilbókingarnar var, at tað var fyri at tryggja arbeiðspláss í Norðdepli.

*Er hetta orsøk nokk til at broyta roknskapin?*

– Sum eg havi sagt, so er málið fyri mítt víðkomandi avgreitt, tá notatið varð skrivað, og eg síggi onga orsøk at fara inn í tað aftur. Sum sagt er samanhangurin, at vit royndu fáa virki og skip soleiðis, at eingin, hvørki arbeiðsfólk ella hýrur, ikki fingu sítt útgoldið, sigur løgmaður.

### Tók sjálvur ábyrgd

Í bókini, Skjót journalistin, kemur eisini fram, at løgmaður hevur roynt at givið fyrrverandi formanninum á Frostvirkinum, Jason Johannesen, skuldina fyri feilbókingarnar, sum vóru gjørdar. Hesum vísir Anfinn Kallsberg staðiliga aftur.

– Hatta er púra burtur við, tí eg havi ikki givið nøkrum øðrum skyldina, tí ábyrgdin var mín og eg tók hana á meg, tá eg undirskrivaði notatið, sigur løgmaður.

Hann sigur, at málið um fortíðina hjá sær hevur fleiri ferðir verið frammi, og at fólk vita full væl, hvat fór fram.

– Løgreglan valdi ikki at gera nakað við málið tá, og eg havi síðan verið seks ferðir uppstillaður, og fólksins dómur hevur verið greiður Eg ætli mær ikki at komentera málið meir. Eg kann leggja afturat, at bókin er skrivað av tveimum journalistum, sum ongantíð hava kontaktað meg, og meira hava eg ikki at siga til tað, sigur Anfinn Kallberg at enda.

# Fólkaflokkurin tekur tað róligt

**Formaðurin í tingbólkinum hjá Fólkaflokkinum, Óli Breckmann, sigur, at flokkurin hevur ongar ætlanir um hoppa eftir hjá pástandunum hjá Øssur Winthereig og Grækaris Magnussen um skjalafalsanina hjá løgmanni**

LØGMANSNOTATIÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Flokkurin hjá løgmanni, Fólkaflokkurin, er ikki tikin á bóli av niðurstøðunum í bókini, Skjót journalistin, um fortíðina hjá løgmanni. Formaðurin í tingbólkinum, Óli Breckmann, sigur, staðfestingin hjá Øssur Winthereig og Grækaris Magnussen um skjalafalsan er ikki annað enn ein pástandur hjá tveimum journalistum.

– Tað er væl teirra orð, og vit í Fólkaflokkinum hava ongar ætlanir at hoppa eftir Øssur Winthereig og Grækaris Magnussen, teirra pástandum. Teirra pástandur má væl standa sína roynd, og halda vit, at tað er grundarlag fyri eini injurie sak, so umhugsa vit tað, sigur Óli Breckmann.

Hann leggur tó afturat, at Fólkaflokkurin hevur ikki viðgjørt spurningin, og flokkurin tekur tað púra róligt.

– Hatta málið er tugt og jabbað leingi, og nógvar royndir hava verið gjørdar fyri at staðfesta henda iva, men tað er ikki eydnast enn, og eg dugi ikki at siga tær, um tað nú er eydnast, greiðir formaðurin í tingbólkinum hjá Fólkaflokkinum frá.

Óli Breckmann vil einki siga um hvørjar avleiðingarnar eiga at verða, um tað vísir seg, at føroya løgmaðurin hevur svikað, tí hann heldur tað er ein púra hypotetiskur spurningur.

*Kemur staðfestingin óvart á teg?*

Nei slett ikki, tí hasir báðir fýrarnar júst arbeiða fyri at finna saftigar søgur, sigur hann.

### Ikki diskuterað

Óli Breckmann sigur, at Fólkaflokkurin hevur ikki diskuterað, hvussu flokkurin ætlar at viðgera málið um fortíðina hjá Anfinni Kallsberg.

*Hvussu langt kann leiðslan í Fólkaflokkinum geva seg, um tað tað vísir seg, at journalistarnir hava hald í sínum máli?*

– Í bókini er tað sannleikin sambært Øssur Winthereig og Grækaris Magnussen sum verður lagdur fram, og eg vænti ikki har er nógv meira, enn tað vit hava hoyrt um málið í ein fjóðringsøld, men lat okkum síggja um talan er um annað enn sensationsjournalistik. Møguliga kann bókin vísa á, at tað var eitt ella annað tá. Vanlig mannagongd var, at virki og skip hoyrdu saman, og hatta var ein neyðartíð, har man royndi sum frægast, sigur Óli Breckmann.

*Kann føroya fólk liva við einum løgmanni, sum hevur skjalafalsað?*

Tað veit føroya fólk best sjálvi, og tey hava verið nøgd við hansara arbeiði seinastu fimm árini, og tey mugu tí í góðari grund hava álit á manninum, sigur Óli Breckmann at enda.



*Tingformaðurin í Fólkaflokkinum, Óli Breckmann, sigur at Fólkaflokkurin tekur tað púra róligt. Flokkurin hevur ongar ætlanir um at hoppa eftir pástandunum hjá Øssur Winthereig og Grækaris Magnussen, sum hann málber seg*



# Tjóðveldisflokkurin kúrrur

**Hvørki formaðurin í Tjóðveldisflokkinum, Høgni Hoydal ella tingmaðurin, Tórbjørn Jacobsen vilja gera stórvegis viðmerkingar til staðfestingnar um skjalafalsanina hjá løgmanni. Tórbjørn Jacobsen sigur kortini, at tað kemur ikki heilt óvart á hann**

LØGMANSNOTATIÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Rokið um fortíðina hjá løgmanni, Anfinni Kalsberg, kom aftur fram í ljósmála í fjørsummar, eftir eitt hvassorðað lesarabræv frá tjóðveldistingmanninum, Tórbjørn Jacobsen í fjør summar.

Orðingin "Ringt er at liva við einum løgmanni og einum fiskimálaráðharra, sum orsaka av eini gloymdari fortíð, har ilt var at skyna á mørkunum ímillum eins egna og annara, ikki kundu sitið í stjórn í nøkrum øðrum landi heiminum", setti veruliga eld í føroysku fjølmiðlarnar, sum aftur fóru at grava í fortíðini hjá løgmanni.

Fólkaflokkurin vildi ikki góðtaka skuldsetingarnar hjá Tobba, og málið gjørdist samgongumál, sum ikki varð loyst fyrr enn á Ólavsøku. Í bókini Skjót journalistin verður skuldsetingin hjá Tórbjørn Jacobsen um gloymdu fortíðina hjá løgmanni staðfest.

### Ikki óvart

Tórbjørn Jacobsen sigur, at skjalafalsanin kemur ikki heilt óvart á hann, og hann hevði allarhelst ikki nevnt fortíðina hjá løgmanni í lesarabrævinum, uttan at hann hevði grundaðan mistanka. Tórbjørn vil kortini ikki gera stórvegis viðmerkingar til, hvørjar avleiðingarnar av skjalfalsanin hjá løgmanni eiga at fáa.

– Tað mást tú spyrja formannin í flokkinum um, tí málið er eitt floksmál, sum ein og hvør tingmaður ikki kann úttala seg um, sigur Tórbjørn Jacobsen.

*Hevur tú onga persónliga meining um, hvør avleiðingin skal verða?*

Jú, men tað er ikki altíð at tær persónligu meiningarnar kunnu koma út, áðrenn tær eru samskipaðar í flokkinum. Eg fái heldur ikki úttalað meg áðrenn bókin kemur út, sigur tjóðveldistingmaðurin.

### Onga viðmerking

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum, Høgni Hoydal, er rættiliga avgjørdur, tá vit greiða honum frá, at løgmaður, sambært bókini Skjót journaslistin, hevur skjalafalsað.

*Kunnu tit sum flokkur liva við tí?*

Eg havi onga viðmerking yvirhøvur, tí eg havi onga bók sæð.

*Hvørjar eiga avleiðingarnar at verða?*

Eg kann einki siga yvirhøvur, tí eg sum sagt ikki havi sæð bókina. Tað einasta, eg veit er, at Tjóðveldisflokkurin hevur fingið eitt bræv frá Fólkaflokkinum um bókina.

*Ætla tit at svara brævinum?*

Nei tað ætla vit ikki, og skilji heldur ikki hvat endamálið er við brævinum, og hví tjóðveldisflokkurin skuldi dragast inn í málið.

### Tegir

Tjóðveldisflokkurin hevur eftir øllum at døma valt tann tigandi leiklutin. Í øllum førum í fyrstu atløgu. Til bókin er tugd og tannlað. Sjálvur sigur løgmaður, at hann framdi óregluligu flytingarnar fyri at bjarga sínum skipum og harvið arbeiðsplássum. Hann vísir til semjuna, har honum varð álagt at rinda lítlu milliónina aftur og vil ikki siga meira.

Spurningurin er, hvat Tjóðveldisflokkurin kann liva við. Hann hevur gjørt tað til sítt vørumerki at tosa um reinføri í føroyskum politikki og álitið á politisku skipanina.

Eitt er, at løgmaður hevur gjørt mistøk – tilvitað ella ei – í síni fortíð. Kanska kann Tjóðveldisflokkurin liva við tí. Men kann hann góðtaka, um Anfinn Kallsberg hevur sagt ósatt um viðurskiftini á Frostvirkinum, meðan hann hevur verið løgmaður? Og at hann setti samgonguna upp á spæl fyri at bjarga sínum umdømi? Tað fara næstu dagarnir at vísa.



*Tað var Tórbjørn Jacobsen, sum setti eld í málið um fortíðina hjá løgmanni aftur við einum hvassorðaðum lesarabrævið í fjørsummar. Nú skuldsetingin hjá honum verður staðfest í bókini, Skjót journalistin, hevur hann kortini ikki stórvegis viðmerkingar til málið.*
*Mynd: Savnsmynd*





Ynskjur tú at gerast teldunørd?

- men orkar ikki at fara undir bert ástøðiliga útbúgving?
So hevur tú møguleikan nú at fáa eina meira verkliga telduútbúgving...
Vit bjóða tær fjølbroytta útbúgving, har tú hevur møguleika at arbeiða sum t.d. mennari (udvikler), sniðgevi (designer) ella KT-ráðgevi (systemkonsulent). Útbúgvingin skiftir millum skúla og starvsvenjing.
**NetStarv** er ein 16 mánaðar long útbúgving. Hugsanin er at nýta tøknina, soleiðis at luttakararir kunnu leggja orku í at verða kappingarførir á arbeiðsmarknaðinum.

**Áhugaði kunnu venda sær á tlf. 350070 ella 211135.**
**Umsóknir skulu verða okkum í hendi, í seinasta lagi týsdagin 9. desembur 2003 kl. 16.00.**

www.alv.fo

**Málbólkur**
Serliga ætlað fólki, ið í størri ella minni mun eru førleikatarnaði, sum hava eina miðnáms og/ella víðari útbúgving ella aðrar javnbjóðis royndir. Hóast brekið hava góð útlit til at røkja eitt arbeiði fulla tíð innan eitt nú KT-vinnuna.

**Endamál**
Málrættað útbúgving til óstuðlað arbeiði á ávísari fyritøku, t.d. sum mennari, formgevi ella KT-ráðgevi.

**Starvsvenjing**
Útbúgvingin er verklig. Umleið helvtin av tíðini er starvsvenjing á eini fyritøku.

**Innihald**
Eftir gjølla ástøðiliga læring, skulu luttakararnir gera seg serkønan á ávísum økjum, t.d. dátugrunnum, sniðgeving og interaktiviteti. Útbúgvingin skiftir millum undirvísing og starvsvenjing.